# Eivør bara á G!



**Eivør spælir á G! í summar, og bara á G!, hetta almannakunngjørdi festivalurin í morgunsendingini hjá Útvarpi Føroya í dag**

FESTIVAL SUMMARIÐ

Eins og Valravn og Teitur verður eisini Eivør Pálsdóttir milllum nøvnini á ársins G!Festivali í ár. Eivør luttók á trimum teimum fyrstu G! Festivalunum, men síðsta ár var hon ikki við. Í ár fer hon so aftur á pallin í Syðrugøtu.

Eivør varð á Planet Awards kosin besta føroyska songkvinnan, og hevur síðan tá vunnið DMA-Folk heiðurslønirnar fyri bestu vísufløgu og bestu kvinnuligu songrødd í Danmark. Hon hevur eisini verið á fullkomiliga útseldari konsertferð í Danmark, ein sera væleydnaðari konsertferð í Kanada og í summar er hon við á Roskilde Festivalinum.

Eivør Pálsdóttir er eitt kent navn í føroyskum, íslendskum og donskum tónleiki. Eivør gav í fjør vár fløguna Trøllabundin út saman við Danmarks Radio Big Band.

Hon var fleiri konsertferðir við hesum orkestri. M.a. spældu tey eina stórfingna konsert í Opera húsinum í Keypmannahavn.

Røddin hjá Eivør er tiltikin góð. Hon vann heilt ung Ársins Songrødd, og í 2001 vann hon Prix Føroyar við Clickhaze. Hon hevur higartil givið fimm fløgur út, her telist maksifløgan við Clickhaze ímillum. Harumframt hevur hon luttikið á alskyns upptøkum og savnsfløgum.








## Kári Sverrisson á Skarv

Kári Sverrison fer leygarkvøldið kl. 23 á pallin á Skarv. Hann er enn eitt stórt føroyskt tónleikanavn, ið vitjar nýggja spælistaðið fyri føroyingar í Keypmannahavn.

Eru vit til, spurdi Kári Sverrisson í sanginum, sum hann skrivaði til kappingina hjá Amnesty International fyri sløkum 15 árum síðani. Tað var tað fyrsta, sum føroyingar veruliga hoyrdu til sangskrivaran og sangaran Kára Sverrisson.

Nøkur ár frammanundan gjørdi hann nógv við at vera málmaður í fótbólti, men hann læt seg úr handskunum og tók heldur gittar hond.

Kári er sentralur limur í tónleikabólkinum Enekk, sum er ein nýskapandi fólkatónleikarabólkur, og millum og eftir útgávur hjá Enekk hevur Kári Sverrisson spælt sum solistur. Tað verður sum solistur, at hann spælir á Skarv leygarkvøldið.

Hann hevur javnan framførslur við tónleiki hjá sær sjálvum og øðrum. Hann er ein gávaður og nýskapandi sangskrivari, sum telist millum teir størstu vísusangararnar, sum Føroyar hava átt.

## Fundast um gerðarætt

2. mai verður skipað fyri almennum fundi um fastan gerðarætt.

Sáttmálin um fasta gerðarrætt kom í gildi 1. apríl 2006, og væntandi verður fasti gerðarrættur til reiðar at taka ímóti og viðgera mál antin 1. mai ella stutt eftir tann dag.

Flestu partar á arbeiðsmarknaðinum hava skrivað undir sáttmálan, løgtingið hevur samtykt lóg um mál hjá fasta gerðarrætti, og játtanarlóg er til viðgerðar á tingi, so himild verður at stuðla stovninum í fyrstuni. Tískil er sáttmálin um fasta gerðarrætt vorðin grundarlag undir viðgerð av trætumálum á arbeiðsmarknaðinum, ið viðvíkja kollektivum sáttmálum í sáttmálaskeiðnum.

Fundurin verður í Norðurlandahúsinum týsdagin kl. 10 til 13. Bjarni Djurholmm, landsstýrismaður í vinnumálum, leggur fyri, áðrenn formaðurin í nevndini fyri gerðarættin, Kári á Rógvi, greiðir frá skipanini. Síðani fer advokaturin Michael Berner at umrøða hugtakið, áðrenn prát, kjak og matur standa á skránni.

-mørk